# Spæligle

**Bæði Lama Sea og GoGo Blues borðreiddu við einari livandi spæligleði, sum bóru bólkarnar víðari í hálvfinaluna**



*Lama Sea vóru komnir fyri at undirhalda og áhoyrararnir fingu undirhald fyri allar pengarnar*

UMMÆLIÐ
*orð: Tór Verland Johansen*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Lagt varð upp til eitt spennandi fyrsta umfar av Prix ’05 í Fuglafirði leygarkvøldið. Fínpussaðu DejaVu og garvaðu GoGo Blues vóru hálvavegna skyrdir sum favorittar innan umfarið, men eisini outsidarirnir Lama Sea og SIC lógu og lúrdu. Eftir nakrar væleydnaðar framførslur, var stórur ivi um, hvør skuldi fylgja GoGo Blues til hálvfinaluna, tí nú var Paradox brádliga eisini vorin ein lítil møguleiki. Tá avtornaði høvdu lívligu Lama Sea smoygt seg framvið bæði DejaVu, SIC og Paradox.

## Góðir men stillir

DejaVu, ið gjørdis nr. 2 í finaluni í 2003, løgdu fyri hettar kvøldið. Teirra framførsla var ikki so nógv ørðvísi enn fyri tveimum árum síðani. Einkul løg við rættuliga stemningsfyltum soundið, kryddað við offbeat rýtmum. Tað hoyrdist væl, at teir hava spælt nógv saman í seinastuni. Teir vóru sera væl samanspældir og góvu sum heild áhoyrarunum eina góða framførslu.

Fyrsta lagið "If someone calls you" var fjølbroytt og kensluborið, og kanska tað besta lagið hjá DejaVu hetta kvøldið. Intro’in til næsta lagið við trummum og klaver var góð, men í niðurlagnum, har Líggjas Olsen við langum tónum sang, burdi Flóvin E. Viderø stuðlað við einari lekrari aðrustemmu. Spell ikki at útnytta tað góða sang-potentialið í bólkinum til fulnar, eins og gjørt varð í tí triðja lagnum, tí tað riggar væl, tá ið teir báðir syngja í senn.

Sum heild vóru løgini hjá DejaVu góð, men tó eitt sindur óinteressant. Møguliga var tað sjálv framførslan hjá DejaVu, ið var orsøkin til hetta. Sum áhoyrari fekk ein ta kenslu, at bólkurin spældi fyri sær sjálvum, heldur enn at framføra fyri fólkunum í salinum. Eitt nú høvdu teir stilla soleiðis upp, at Líggjas vendi ryggin til restina av bólkinum, tá ið hann spældi klaver og sang. Tað sá undarligt og innanhokið út. Eisini sýntist tað løgið og óneyðugt, at Flóvin sat á einum stóli og spældi guitar. Gamaní, tað er óivað eitt tilvitað val at sita stillur og síggja innhugsin út, men tað læsir bólkin fastan og skapar eina keðiliga frástøðu til áhoyrarnar. Haldi ikki, at tónleikastílurin krevur hesa frástøðu, hóast hann er kensluborin og laidback. Tvørturímóti. Endamálið má verða at upptraðka og skapa áhuga fyri tí, man hevur at framføra. Tað er nevnliga munur á at sita í studio og spæla, og so at framføra fyri áhoyrarum. Tað merkir ikki at man partú skal upp at hoppa og leika í, men at man ikki bara tekur seg sjálvan í álvara, men eisini tey, man spælir fyri.

## Livandi spæligleði

Longu áðrenn teir byrjaðu at spæla, sást týðiliga, at hesir ungu garpar vóru livandi og fullir av spæligleði. Lama Sea vóru komnir fyri at undirhalda og áhoyrararnir fingu undirhald fyri allar pengarnar. Teir spældu ikki fyri sær sjálvum, men fyri fólkunum úti í salinum. Tað er eingin ivi um, at bólkurin yvirraskaði nógvar áhoyrarar positivt við sínum lætta funk- og sving-rokki.

Við lagnum "Spending all my love" var stílurin lagdur. Við einum skemtiligum og fjákutum Janusi Rasmussen sum forsangara, mintu teir ikki sørt um danska bólkin "Tin Tin og Hårtørrerne". Kanska ikki í tónleiki, men í øllum førum í stíli. Jón Klæmint Hofgaard á guitar og Sakaris Emil Joensen á bass fylgdu stílinum hjá Janusi, og saman fingu teir tríggir frontfigurarnir rættuliga fólki við. Úti í høgra borði stóð trumfurin hjá bólkinum, Tróndur Herason, og kryddaði við sínari trompet.

Tað krevur nógv yvirskot reint tónlistaliga at kunna upptraðka so orkumikið og útfarandi sum Lama Sea gjørdi. Av og á hoyrdist týðiliga, at nógva orkan, ið brúkt var at halda skemtiliga stílin, ávirkaði tað tónlistarliga samanspælið og sangstemmurnar. At spæla skitið merkir ikki, at man ikki skal spæla tight. Stílurin, løgini og útsetingarnar eru longu har, og um Lama Sea skal yvirraska alt og øll og náa finaluna, skulu teir leggja seg eftir eisini at fáa sjálvan tónleikin at svinga 100% alln vegin meðan teir upptraðka.



*Tað tunga og tað harða veruliga skuldi buldra úr hátalarunum, tá SIC sum seinasti bólkurin kom á pallin*

## Teknikkurin sveik

Triði bólkurin — ella duo’in — Dimmi, kom ikki væl frá byrjanini. Hvørki so ella so. Fyrst virkaði teknikkurin ikki, og tað var sjálvandi sera óheppið og synd. Men tað var eisini torført at síggja og hoyra, hvat konseptið í veruleikanum var.

Veit ikki, hvørji krøv verða sett fyri at kunna luttaka sum bólkur ella duo í Prix Føroyar, men tað tykist sera løgið, at fyrireikararnir hava loyvt Dimmi at luttaka við pre-innspældum tónleiki á palli. Gamaní segði Gulli Johansen av og á okkurt í mikrofonina, og av og á dansaði hann á pallinum, men meginpartin av tíðini hugdi hann í ein telduskerm, meðan Malan Tyril sang inn yvir tann innspælda elektroniska tónleikin.

Av teim upprunaligu 32 tilmeldaðu bólkunum, vórðu heili átta sáldaðir frá. Synd, um onkur av teim átta var ein bólkur, sum spældi livandi tónleik.

## Í heimsklassa

Um tú skalt marknaðarføra blues tónleik so droppa Gary Moore, Robben Ford, B.B. King og John Lee Hooker. Ring til GoGo Blues, og bið teir koma.

GoGo Blues komu, spældu og sigraðu. Uppá allar mátar vóru GoGo Blues í einum klassa fyri seg í Fuglafirði. Við teirra royndum og dygdum vóru teir møguliga favorittar hetta kvøldið, men at teir skuldu vera so cool og borðreiða við einari so einastandandi framførslu, var eitt sera positivt yvirraskilsi.

Møguliga vóru tað nógvir áhoyrarar, sum ikki høvdu hoyrt ordiligan blues-rokk áður, men longu tá fyrsta lagið byrjaði, gjørdust fólk varug við, at bólkurin hevði nakað serstakt at bjóða. Tað var einki minni enn bluesrokk í heimsklassa! Bólkurin spældi sum ein samansjóða eind og við sínari feitu bluesrødd og eminenta guitarspæli, gav Uni Debes alt, hann átti.

Hóast tað fyrst og fremst svingaði totalt, vóru eisini detaljurnar í hásæti. Stundum flættaðu solo’irnar hjá Una seg inn millum djúpu, men kontantu bass tónarnar hjá Arnold Ludvig og